# Andstøðan øtast

**Bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin halda lítið um atburðin hjá løgmanni í sambandi við samgongusamráðingarnar**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*Flokkarnir hjá Lisbeth og Jóannes eru alt annað enn nøgdir við leiklutin hjá løgmanni, Anfinn Kallsberg.*
*Mynd: Jens Kristian/Finnur*

– Hetta er óvirðiliga støða, og Føroya fólk hevur ikki uppiborið slíka politiska leiðslu.

So avgjørdur skrivar Sambandsflokkurin í tíðindaskrivi í sambandi við framferð løgmans í samgongusamráðingunum.

Tað er rættiliga komin røring í, tí bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava nú sent út tíðindaskriv um løgmann og hansara samráðingarroyndir.

Sambandsflokkurin er av teirra fatan, at tað er loysingarhugurin hjá løgmanni og Fólkaflokkinum, sum hevur forðað fyri einari breiðari samgongu.

Sambandsflokkurin heldur ikki, at løgmaður hevur havt nakra orsøk at útilokað Sambandsflokkin frá samgongusamráðingunum.

– Allar umberingarn um vantandi undirtøku fyri ávísum yvirtøkum ella hóttanum um endaliga innliman í danska ríkið eru burturvið og uttan nakað sum helst samsvar við veruleikan, sigur Sambandsflokkurin í tíðindaskrivi.

Boðini frá Sambandsflokkinum eru, at løgmaður eigur at leggja frá sær.

## Javnaðar

Eisini Javnaðarflokkurin er ónøgdur við leiklutin hjá løgmanni.

– Í sambandi við uppsteðgaðu samráðingarnar um eina breiða samgongu millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin, Sjalvstýrisflokkin og Tjóðveldisflokkin legði formaður Javnaðarfloksins á fundi í Tinganesi fyrrapartin í gjár hin 24. mei 2002 eitt uppskot fyri løgmann. Eitt uppskot, sum tók støðu í tí máli, ósemja var um undir samráðingunum, men sum kundi loyst knútin, íkomin var.
Løgmaður metti uppskotið at vera eina gongda leið burtur úr fastlæstu støðuni.

Enn hevur Javnaðarflokkurin einki frætt aftur frá løgmanni.

Javnaðarflokkurin hevur sent út einki minni enn tvey tíðindaskriv. Teir harmast m.a., at løgmaður í Útvarpi Føroya skal hava sagt, at Javnaðarflokkurin hevur havt møguleikan seinastu vikurnar.

Hvat annars er farið fram síðan valið 30. apríl 2002, er at siga, at Javnaðarflokkurin og uttan iva eisini aðrir flokkar bert hava bíðað, meðan Fólkaflokkurin hevur samráðst við seg sjálvan.

– Tað harmar eisini Javnaðarflokkin almikið, at Høgni Hoydal vegna Tjóðveldisflokkin ikki hevur fingið fráboðan frá løgmanni um seinasta útspælið frá Javnaðarflokkinum soleiðis, at fyrstnevndu samráðingar kundu verið tiknar uppaftur, endar Javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi mánamorgunin.

# Samgonga nærkast

**Sambært Jenis av Rana, formanni Miðfloksins, ganga samráðingarnar av besta slag, og ein samgonga kann ógvuliga sannlíkt gerast veruleiki innan stutta tíð**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

– Skulu vit meta eftir leygardegnum, so gongur ikki lang tíð, áðrenn ein samgonga er komin undir land, sigur Jenis av Rana, formaður fyri Miðflokkin.

Jenis og Miðflokkurin er komin til samráðingarborðið, eftir at einki úrslit spurdist burturúr royndunum at skipa hina sokallaðu breiðu samgonguni við bæði Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum inni í myndini.

Ístaðin hevur Anfinn Kallsberg valt at kalla inn Miðflokkinum til samráðingar við Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Talan kann sostatt gerast um eina samgongu við seytjan tingmonnum, sum eigur meirilutan á tingi.

Sjálvur var Jenis av Rana ógvuliga fegin um møguleikan at vera í samgongusamráðingum, og tað kemur als ikki óvart á hann. Tá vit fingu fatur á honum árla mánamorgunin, hevði hann ógvuliga góðar vónir til samráðingarnar, sum hann helt gingu væl, og ein loysn var í eygsjón, hóast tað var ivasamt, um hetta fór at henda, áðrenn tingið kemur saman at velja nevndir(týsdagin, blðm.)

– Eg havi bara bíðað til møguleikin kom; tá løgmaður gjørdist liðugur við at royna tað ómøguliga, sigur Jenis av Rana.

Hjartamálið hjá Miðflokkinum er trivnaðarmál, og tað er eisini hetta málsøki, ið flokkurin kundi hugsað sær í einum samgongusamstarvi.

– Tað er okkara ynski at fáa familju- og trivnaðarmál saman við kanska almennamálum, sigur Jenis av Rana, sum undirstrikar, at teir meta hetta økið vera ógvuliga nógv forsømt seinastu árini.

Sjálvur hevur Jenis av Rana einki ímóti, at verandi fullveldiskós heldur fram.

– Nógv ferð er longu tikin av fullveldiskósini, og tað ger einki fyri okkum, um henda kós heldur áfram ella ferðin veksur. Hinvegin ger tað heldur einki, um ferðin verður minkað eitt sindur. Tað er ikki fullveldi, ið er tað týdningarmesta fyri okkum, sigur Jenis av Rana.

Í teimum undanfarnu samráðingarumførunum á hesum sinni hevur einamest verið ósemju um spurningin viðvíkjandi fullveldiskósini, og spurningurin um løgmanssessin hevur eisini verið tungur at fingið upp á pláss. Eftir útsagnunum hjá Jenisi av Rana at døma, so skuldi hvørgin av hesum spurninginum verið nakar trupulleiki.

## Gott lag

Eftir steðg hvíldardagin møttu umboð fyri samráðingarflokkarnar upp á Gamla apoteki mánamorgunin. Lagið var eisini gott á monnum, og allir tóktust at vera avslappaðir við støðuna.

Í trappuni hittu vit Høgna Hoydal, Anfinn Kallsberg, Kára P. Højgaard og eina løtu eftir hinar kom eisini Jenis av Rana. Høgni Hoydal ynskti ikki at gera viðmerkingar, men lat heldur Anfinn Kallsberg, løgmann, um hesa uppgávuna.

Løgmaður vildi tó ikki siga annað enn, at teir vóru í holt við realitetssamráðingar, og hetta arbeiddu teir við í løtuni. Hann vildi ikki siga nakað um, hvar teir vóru komnir til, og hvat restaði í.

– Tú veitst ikki, um tú hevur nakað, fyrr enn tú hevur alt við tílíkar samráðingar, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Anfinn Kallsberg visti ikki at siga, um talan fór at gerast um ein valbólk, tá tingið kemur saman (týsdag, skrivað mánadag).

– Tað er soleiðis, at mann má prioritera, hvat mann vil hava í einari samgongu, og mann má nýta teir møguleikar sum eru, sigur løgmaður í svari til spurningin, hví Miðflokkurin nú er boðin til samráðingarborðið.

Spurningurin er so, hvussu nógv tað ber til at lesa av góða lagnum. Vit kunnu so í øllum førum fyribils bara bíðað løgtingsfundinum og samráðingunum víðari.



*Tað gongur tann rætta vegin hjá Jenisi av Rana og Miðflokkinum. Teir eru nú tiknir við í samgongusamráðingar, ið teir alment hava ynskt í longri tíð, og Jenis av Rana letur væl at.*
*Mynd: Finnur Justinussen.*



# Italskur handbóltsmálverji eftirlýsir føroyskar upptøkur

**Føroyingar eru síðsta vónin hjá italska málverjanum undir C-HM-kappingini í Føroyum í 1980. Seinastu ellivu árini hevur Mario Magelli sitið í koyristóli eftir eina ferðsluvanlukku. Nú sóknast hann eftir livandi myndum at vísa dóttrini, sum ongantíð hevur sæð pápan ganga ella renna**

EFTIRLÝSING
*Turið Kjølbro*

Nógv minnast C-HM-kappingina í manshandbólti, sum var í Føroyum í 1980. Tað ger Mario Magelli, sum var málverji og liðformaður fyri italska landsliðið tá, eisini. Seinasti dysturin í teirri kappingini gjørdist eisini tann seinasti altjóða dysturin, har Mario Magelli vardi italska málið fyri italiumenn. Nú vendir hann sær til føroyingar í einum heilt serligum ørindum. Hann sóknast eftir video- ella filmsupptøkum frá C-HM-kappingini í Føroyum. Um nakrar eru, vil hann ógvuliga fegin síggja og keypa tær.

Í mars í 1991 var Mario Magelli so óheppin at fáa ein álvarsligan løst í eini ferðsluvanlukku. Í dag er hann lamin og fær hvørki brúkt armar ella bein.

- Mítt lív er broytt fullkomiliga eftir vanlukkuna, men eg fái kortini arbeitt, sigur Mario Magelli, sum er útbúgvin sálarfrøðingur.

- Eg havi nógvar vinir millum fyrrverandi handbóltsfelagar, og eg havi eina dóttur, sum er ellivu ára gomul.

Síðani vanlukkuna fyri 11 árum síðani hevur hann havt eitt brennandi ynski um at fáa fatur video-upptøkum, har hann er á.

- Eg sóknist eftir upptøkum, har er spæli. Grundin til tað er, at eg vil so øgiliga fegin vísa dóttur míni ein pápa, sum spælir, rennir og hoppar, tí tað hevur hon ongantíð sæð meg gjørt, sigur Mario Magelli.

Heima í Italia hevur Mario Magell sóknast eftir upptøkum nógva staðni, men av tí, at tað als ikki var so vanligt at taka upp video og film í sjeyti árunum, tá ið Magelli var virkin handbóltsspælari, hevur hann enn ongar upptøkur funnið. Hvørki italskt sjónvarp ella italska handsbóltssambandið hava upptøkur við Magelli.

Føroyingar eru tí síðsta vónin hjá Magelli.

- Meg minnist, at tá ið C-HM-kappingin var sett í februar í 1980 segði táverandi formaðurin í føroyska handbóltssambandinum, at kappingin var ein tann mest umráðandi ítróttarhendingin í Føroyum nakrantíð. Tí er møguligt, at onkrar upptøkur eru av onkrum dysti, vónar Magelli.

Magelli spældi við í fyrsta dystinum, sum var í kappingini. Hetta var 2. februar og hesin dysturin varð spældur í ítróttarhøllini í Havn ímóti føroyingum.

- Kanska onkur tók tann dystin upp og eg kann gera dreymin hjá mær til veruleika og vísa dóttrini eina rennandi og hoppandi pápa, sigur Magelli.

Hann hoyrir fegin frá fólki og er fúsur at gjalda fyri eitt eintak av einum videobandi umframt eykakostnað. Adressan hjá Mario Magelli er Via Corelli n. 21, 40141 Bologna, Italia. Teldupostadressan er: serclick@tin.it

Sosialurin hevur vent sær til Handbóltssambandið og onnur, og fregnast eftir, um livandi myndir eru av italska málverjanum. Hesi hava øll kannað málið, tó enn er einki funnið. So er at vóna, at onkur áskoðari til onkran dyst, italiumenninir spældu í februar 1980, var so framskygdur at taka upp film ella video. Mario Magelli bíðar í øllum førum spentur at hoyra frá føroyingum.

## C-HM 80

Soleiðis skrivar Myndaárbókin 1980 um C-HM-kappingina: Triðju ferð, altjóða hondbóltssamgongan IHF skipaði fyri heimsmeistarakapping í C-bólkinum fyri europeisk lið, fór kappingin fram í Føroyum við føroyska hondbóltslandsliðnum sum eitt av teim tíggju luttakandi liðunum. Fyriuttan Føroyar luttóku Noreg, Frakland, Eysturríki, Ísrael, Portugal, Belgia, Luxembourg, Italia og Bretland.

C-HM 80 stevnan varð sett 1. februar í Ítróttarhøllini í Havn, beint eftir, at Smyril var komin úr Aberdeen við luttakarunum til kappingina. Umleið 800 fólk vóru samankomin til hesa fyrstu HM-kappingarsetan á føroyskari grund. Kappingin, sum eydnaðist væl í allar mátar, fór fram í Ítróttarhøllini í Havn, Klaksvík og Vági. Á myndini omanfyri sæst føroyska liðið saman við liðleiðara, venjara og formanni í hondbóltsdeildini.

Kári Mortensen á føroyska liðnum gjørdist besti málskjútti í allari kappingini við 47 málum. Ísraelska liðið fekk “fairplay”-steypið. Vinnandi liðið gjørdist Noreg. Føroyar gjørdust nummar seks í kappingini, Italia nummar níggju.




Ert tú bitin av web's :-)



Ert tú internetforritari og leitar eftir avbjóðingum? So leita vit eftir tær.

Sansir eru eitt samskiftisvirki, har marknaðarføring á internetinum fær ein alsamt størri leiklut.

Vit eru í millum annað í ferð við at menna eina CMS-skipan (Content Management System), ið hevur víst seg at vera væl umtókt. Vit arbeiða við dynamiskum loysnum, sum eru skraddaraseymaðar til virki og felagsskapir. Tín uppgáva verður at vera við til at menna skipanina og gera serligar loysnir til einstaka virkið.

Tú hevur viðkomandi útbúgving, ert datamatik-ari, datanom ella líknandi. Tú hevur kunnleika til ASP og SQL, og tað er ein fyrimunur, um tú kennir til COM-komponentar og dugir at handfara Visual InterDev. Royndir á økinum eru eisini ein fyrimunur, men ongin treyt.

Tú fært góðar møguleikar fyri menning – bæði fakliga og menniskjaliga.
Vit kunnu bjóða tær skeiðmøguleikar í tann mun, sum tað hóskar inn í arbeiðsgongdina.

Tú skalt vera ágrýtin, røkin og líka arbeiðssamur sum ein vespa. Vilt tú bjóða tínum kunnleika av, og hevur tú hug at menna teg víðari í einum livandi umhvørvi saman við dugnaligum fólkum, so lat okkum hoyra frá tær.

Send okkum umsókn við prógvum og møguligum viðmælum innan 1. juni. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum og fáa meira at vita um starvið.

SANSIR

PF. SANSIR • REKLAMUHÚS • POSTBOKS 1099 • TINGHÚSVEGUR 47 • 110 TÓRSHAVN • TEL 355 355 • FAX 355 350 • SANSIR@SANSIR.FO • WWW.SANSIR.FO

Sansir eru eitt virki, ið tekur sær av heildarsamskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, so tað svarar til samleikan og mentanina hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina útsjónd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi.

Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samlaðu marknaðarføringini.
Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo